## Sakna málpolitikk

Løgfrøðingar og búskaparfrøðingar, sum arbeiða hjá grønlendska heimastýrinum, reisa nú spurningin, sum heimastýrið yvirhøvur hevur áhuga í, at tey starvsfólk, sum ikki hava grønlendskt sum móðurmál, kunnu fáa møguleika at læra seg málið. Fakfeløgini hjá teimum báðum bólkunum siga, at í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum stendur, at landsstýrið fer at leggja dent á at styrkja tað grønlendska málið í almennu umsitingini.

*Almenn starvsfólk í Grønlandi sakna almennan málpolitikk*
*(Mynd: Sermitsiaq)*



# Genialt at keypa Scandia

**Um tað var væntað ella bara heppi, so er úrslitið tað sama. Men tað var í júst røttum tíma, at Eik Banki keypti Scandia Bank, sigur danski fíggjarserfrøðingurin, Bjarne Jensen**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bjarne Jensen heldur, at Eik Banki var sera heppin í keypi sínum av Scandia Bank*

Føroysku bankarnir standa seg væl. Tað vísa roknskapirnir, sum hjá báðum bankum vísa metavlop.

Danski fíggjarserfrøðingurin, Bjarne Jensen, hevur hugt at roknskapunum, men hevur kortini ikki enn havt stundir til at nærlisið teir.

- Teir síggja báðir »fornuftigir« út. Eik Banki hevur eina eginpeningsforrentning upp á 30% og Føroya Banki eina upp á 13,8%, og tð er rímiliga gott, sigur Bjarne Jensen.

Stóri munurin millum bankarnar heldur hann stavar frá stóra virkseminum, sum Eik Banki hevur uttanfyri føroysku landoddarnar. Og hartil hevur Føroya Banki eisini havt ávísar eykaútreiðslur í sambandi við privatiseringina og børsskrásetingina.

Men størsti munurin stavar helst frá keypinum hjá Eik Banka av Scandia Bankanum.

- Tað var júst í røttu løtu, at keypið fór fram. Scandia Banki hevur størri innlán enn útlán, og tað er júst tað, sum bankar í dag skríggja eftir, sigur Bjarne Jensen.

Orsaka av kredittkreppuni í USA eru eisini bankar í Europa varnir við at lána pengar sínámillum, og tí verður tað dýrt at lána pening. So um tað var væntað ella bara heppi hjá Eik Banka, so vísir Bjarne Jensen á, at úrslitið er tað sama.

### Ávirkar kursin

Men danski fíggjarserfrøðingurin ávarar eisini ímóti at stýra sær, nú tíðirnar eru so góðar.

Góðu úrslitini hjá bankunum avspeglar eisini gongdina í samfelagnum.

- Arbeiðsloysið er metlágt, so vónandi finna føroysku politikararnir útav at leggja pening til viks í góðu tíðunum, sigur Bjarne Jensen.

Men hóast góðar tíðir júst nú heldur hann tað vera sera trupult at spáa um, hvussu árið í ár fer at roynast.

Men Bjarne Jensen sigur, at hendir einki óvanligt við bankunum, so fara góðu úrslitini við tíðini at síggjast aftur í kursunum á partabrøvunum.

Og júst kursirnir vóru tað, sum fingu mest umrøðu, serliga tá Føroya Banki bleiv skrásettur á børsinum. Fílst var at, at kursirnir vóru settir alt ov lágt, men hetta hevur síðani víst seg ikki at vera so, tí teir liggja í dag væl undir tí, partabrøvini upprunaliga vórðu seld fyri.

Men sum nevnt væntar Bjarne Jensen, at góðu úrslitini hjá bankunum báðum fara at síggjast aftur í hægri kursum í framtíðini.

# Fólk kunna seg um veðrið

**Heimasíðan hjá Landsverk hevði fleiri enn 3000 vitjanir, tá stormurin herjaði um vikuskiftið**

VINDMÁTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað kann tykjast, sum eru vetrarnir vorðnir harðari við ógvusligum stormum við jøvnum millumbilum.

Ein av uppgávunum hjá Landsverk er at máta vindin, og til hetta endamál eru settir upp 22 vindmátarar kring landið.

- Fyri nøkrum árum síðani ynsktu vit at gerast betri at boða frá koyrilíkindum, og í tí sambandi settu vit upp mátarar, sum ikki bara mátaðu vind, men eisini temperatur og vætu. Hesir mátarar klára bert at máta vind upp til 56 m/s, og teir eru ellivu í tali. Hinir ellivu máta heilt upp í 85 m/s, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk.

Men tað er klárt, at tøknin í dag er so góð, og kostnaðurin lutfalsliga lítil, so hesir mátararnir, sum einans megna at máta upp í 56 m/s, verða skiftir út so við og við.

Gomlu mátararnir virkaðu á tann hátt, at var mest at líkna við veðurhanar, sum snaraðu runt. Men tøknin í dag er so, at alt verður mátað við sensorum.

Tað var táverandi Landsverkfrøðingurin, sum miðskeiðis í 80-unum byrjaði at seta vindmátarar upp, og hagtøl finnast longu frá teirri tíðini. Hetta var í stóran mun gjørt fyri at finna best egnaðu plássini at seta vindmyllur upp. Seinni bleiv so gjørt meiri burtur úr at máta hita og regn eisini.

Oyvindur Brimnes sigur, at fólk kunna seg væl um veðrið, serliga tá tað er ringt.

Um vikuskiftið, tá stormurin var, hevði heimasíðan hjá okkum fleiri enn 3000 vijanir, sigur stjórin á Landsverk.

Hann sigur víðari, at vindurin hevur verið ógvuliga nógvur um vikuskifti.

- Á Norðadalsskarði máldu vit 60 m/s í hvirlunum, og á Stórutjørn yvir 50 m/s, so tað hevur verið ógvuliga nógvur vindur, sigur Oyvindur Brimnes.



*Smærru mátararnir verða skiftir út so við og við, sigur Oyvindur Brimnes*